sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

Sprogin




Einki er meira spennandi fyri títt barn, enn at hyggja eftir tínum andliti. Tá tit liggja andlit til andlits og spæla og tosa, styrkir hetta málmenningina hjá barninum.

# Miðja eftir fimm Umførum




Vaksin skulu royna at fáa eina samtalu í lag við minnst fimm umførum. Børn hava tørv á orðum og hugtøkum, sum hava við teirra áhuga at gera. Við hesum fáa tey íblástur at brúka hesi orð (Dickinson 2012, Bylander og Krogh 2014).

# Lat barnið koma til orðanna




Tað er gott at eggja børnum til at koma til orðanna um ymisk viðurskifti. Bæði heima á stovninum og á túrum, kanst tú til dømis biðja børnini hugsa um hvat ymisk skeltir og ásetingar hava at týða.

Sprogin